VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

**Dagfesting:** 30.03.2021 kl. 18:00
**Fundarstaður:**
**Málnr.:** 21/00003

Til staðar: Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jens Gaardlykke, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke

Varalimir:

Ikki til staðar:

Aðrir partar: Sølvi Símonarson

Fundarskrivari: Jóhan Hendrik Ellefsen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 1/21 | 21/00105-6 | 3. Mál beind í nevnd 2021 | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 53/21 | 21/00089-1 | EXTRA21_01<br>Eykaætlan 01 2021 | 4 |
| 54/21 | 20/00861-2 | Støðutakan til umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 183a og 225e í Sandavági | 6 |
| 55/21 | 21/00173-2 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 236a | 7 |
| 56/21 | 20/00026-21 | Umsókn um byggiloyvi at leingja húsini og byggja kvistar á metr. nr. 121b í Miðvági. | 8 |
| 57/21 | 21/00149-6 | Umsókn um loyvi at byggja dur á matr. nr. 258c í Sandavági | 10 |

VÁGA KOMMUNA

| | | | |
|---|---|---|---|
| 58/21 | 21/00167-2 | Umsókn um byggiloyvi til 20m2 goymslurúm á matr.nr. 142b, úti á Trøð í Sandavági | 11 |
| 59/21 | 21/00199-3 | Johs. Nattestad søkir um loyvi at seta skúrð við mittportur á matr. nr. 418 hjá Nýpuni í Miðvági | 12 |
| 60/21 | 21/00108-2 | Fyrispurningur frá Nám um at gera samstarvsavtalu um undirvísingartilfar til Skúlan á Giljanesi | 13 |
| 61/21 | 21/00177-2 | Áhugafelagið Heimdal søkir um rakstrarstuðul á kr. 20.000 árliga | 14 |
| 62/21 | 21/00152-8 | Umsókn um leigu av lendi í fjøruni vestan- og sunnanfyri matr.nr. 249e í Miðvági | 15 |
| 63/21 | 21/00153-3 | Endurskoðan av gjaldi fyri bátapláss í Vága kommunu | 16 |
| 64/21 | 21/00207-1 | Borgarstjórin leggur uppskot fyri býráðið um at broyta byggisamtyktina fyri Grótbrotið í Sandavági. | 17 |
| 65/21 | 21/00244-1 | Uppskot um at flyta býráðsfundin inn á býráðskrivstovuna í Sandavági | 18 |
| | | | |

Formansváttan: ____________

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 1/21 3. Mál beind í nevnd 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2021 | 1/21 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 30. marts 2021:**

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 53/21 EXTRA21 01
## Eykaætlan 01 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.01.2021 | 10/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 11/21 |
| 3 Býráðið | 02.03.2021 | 48/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 22/21 |
| 5 Býráðið | 30.03.2021 | 53/21 |

**Málslýsing:**

**1. viðgerð av eykaætlan EXTRA21 01**

Eykaætlanin umfatar flyting av óbrúktari játtan í 2020 til nýggja játtan í 2021

| | | |
|---|---|---|
| § 3. | Børn og ung | kr. 16.000,- |
| § 4. | Undirvísing | kr. 250.000,- |
| § 6. | Teknisk mál rakstur | kr. 1.650.000,- |
| § 6. | Teknisk mál løga | kr. 3.712.000,- |
| § 7. | Kommunal virki | kr. 900.000,- |
| § 7. | Kommunal virki løga | kr. 500.000,- |

**Fíggjarnevndin 28. januar 2021:**
**Avgerð:**
Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Viðmælt.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:__________

**2. viðgerð av eykaætlan EXTRA21_01**

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt.

Formansváttan:____________

# 54/21 Støðutakan til umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 183a og 225e í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2021 | 18/21 |
| 2 Býráðið | 30.03.2021 | 54/21 |

**Málslýsing:**

US hevur sent kommununi til ummælis umsókn frá Bjørn Kunoy og Tony og Rúnu av Sondum, eigarar av ávikavist matr. nr. 183a og 225e í Sandavági, um loyvi til, at matr. nr. 183a letur 62 fermetrar við ástandandi hjalli til 225e.
Báðir lutirnir liggja í øki B (sethúsaøki) í byggisamtyktini.

Umsitingin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Tekniska nevnd 12. marts 2021:**

Viðmælt

**Býráðið 30. marts 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

## 55/21 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 236a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2021 | 22/21 |
| 2 Býráðið | 30.03.2021 | 55/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent kommununi umsókn um sundurbýtri av matr. nr. 236a í Sandavági, til ummælis.

Søkt verður um at býtt verður í tveir partar soleiðis at:
Jógvan Arni Petersen, Kári Petersen og Ragnar P. Í Haraldstovu koma at standa fyri einari helvt, og Arngerð Davidsen og Marita Frederiksen standa fyri hinari helvtini.
Biðið verður samstundis um at 8 gyllin á Oknadali (matr. nr. 373d), verða býttir í tvey og lagdir til nýggju matr. nr.

**Tekniska nevnd 12. marts 2021:**

Viðmælt

**Býráðið 30. marts 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 56/21 Umsókn um byggiloyvi at leingja húsini og byggja kvistar á metr. nr. 121b í Miðvági.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2021 | 17/21 |
| 2 Býráðið | 30.03.2021 | 56/21 |

**Málslýsing:**

Umsóknin er fyrr viðgjørd í býráðnum, men av einhvørjari orsøk er leingjan av húsinum, ikki komin við í endaligu samtyktini.

Tekniska nevnd avgjørdi 06. mars 2020 at viðmæla at geva loyvi at byggja uppí húsini, treytað av at matr. nr. 177b og 121b verða lagdir saman í ein matrikul, men frámælti at geva loyvi at byggja kvistar.

20. apríl 2020 samtykti býráðið at beina málið aftur í teknisku nevnd.

21. august 2020 viðmælti tekniska nevnd at geva byggiloyvi til kvistar.

31. august 2020 samtykti býráðið at beina máli aftur í teknisku nevnd.

14. september 2020 viðmælti tekniska nevnd at geva loyvi til at gera kvistar, ið líkjast teimum á myndini niðanfyri.



28. september 2020 samtykti býráðið at geva loyvi at gera kvistar, sum líkjast teimum á myndini.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Av misgávum er umsóknin um loyvi at leingja húsini, dottin niður ímillum í longu viðgerðini av málinum.

Formansváttan:

Umsitingin mælir til at geva loyvi at leingja húsini, treytað av at marknaumskipan verður framd, har matr. nr. 177b letur so mikið til matr. nr. 121b at frástøðan til húsini verður minst 2,5 metur tá uppíbyggingin er liðug.

**Tekniska nevnd 12. marts 2021:**

Viðmælt

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at geva loyvi treytað av, at marknaumskipan verður framd, har matr. nr. 177b letur so mikið til matr. nr. 121b at frástøðan til húsini verður minst 2,5 metur tá uppíbyggingin er liðug.

Herborg H. Gaardlykke luttók ikki í viðgerini av hesum máli.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 57/21 Umsókn um loyvi at byggja dur á matr. nr. 258c í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2021 | 19/21 |
| 2 Býráðið | 30.03.2021 | 57/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 258c í Sandavági søkir um byggiloyvi til dur og hálvtak.

Matrikulin liggur í øki B- Byggiøkið, sethús.

Húsini eru gomul og lítil, og tí eru tey ikki vælegnaði til nútímans nýtslu.

Í ásetingunum í byggisamtyktini er niðanfyristandandi ásett:

*4. Hóast ásetingarnar í 2. 3. og 4. petti kann verða loyvt at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum t.d. dur, baðirúm, fýrrum o.t., so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.*

Umsitingin hevur sent hoyringsskriv, men grannin, sum eigur grannaognina á matr. nr.50c hevur ikki svara hoyringsskrivinum.

Umsitingin hevur tosað við eigaran í telefon, og hevur eigarin givið til kennar, at hann onki hevur ímóti byggingini, um gonguræturin, ið er tinglisin á matr. nr. 258c verður óbroyttur.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Umsitingin mælir til at geva byggiloyvi, treytað av at gonguræturin verður óbroyttur.

**Tekniska nevnd 12. marts 2021:**

Viðmælt, treyta av at gonguræturin verður óbroyttur

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan: ____________

# 58/21 Umsókn um byggiloyvi til 20m2 goymslurúm á matr.nr. 142b, úti á Trøð í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2021 | 20/21 |
| 2 Býráðið | 30.03.2021 | 58/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr.nr. 142b, úti á Trøð í Sandavági, søkir um loyvi at byggja goymslurúm á 20m$^2$.

Matrikulin liggur í øki K2 (Innangarðs), og í byggisamtyktini stendur soleiðis:

2. K2-øki Innangarðs
   a) Innangarðs er bert loyvt at byggja bygning sum er 40 kvm. Á traðarstykki har bygningur er frammanundan[1], kann loyvi bert verða givið til at byggja eitt goymslurúm sum í mesta lagi er 10 kvm. afturat verandi bygningi.
   b) Um búrúm verða innrættaði í húsum á K2-øki, skal eigarin gera góðkenda kloakk- og vatnskipan fyri egna rokning.

*[1] Frammanundan er her at skilja sum tíðarskeiðið fram til kunngerðardagin fyri hesari byggisamtykt.*

Frammanundan er eitt úthús á stykkinum, ið byggiloyvi varð givið til 15.02.2019 og merkir tað, at sambært byggisamtyktini, er ikki loyvt at byggja meir á stykkið.

**Tekniska nevnd 12. marts 2021:**

Frámælt

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

## 59/21 Johs. Nattestad søkir um loyvi at seta skúrð við mittportur á matr. nr. 418 hjá Nýpuni í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2021 | 25/21 |
| 2 Býráðið | 30.03.2021 | 59/21 |

**Málslýsing:**

Johannus Nattestad søkir um loyvi at seta skúr við Miðportur á matr. nr. 418 hjá Nýpuni.
Økið er leiga frá haganum.

22.03.2019 fekk umsøkjarin fyribils loyvi at seta kaffiskúr á matrikulin.

Nú er so ætlanin at koyra galma skúrin burtur av økinum, og seta nýggjan skúr í staðin.

Nýggi skúrurin er 0,90 metur longri enn tan verandi, men verður hann klæddur við timbri, ið verður málað svart. Eisini verður lagt flagtak á hann.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Í verandi fyribilsloyvi er ikki ásett hvussu leingi loyvi er galdandi.

Umsitingin hevur tað áskoðan at um býráðið gevur eitt fyribils loyvi eigur at verða tilskila hvussu leingi loyvi er galdandi.

**Tekniska nevnd 12. marts 2021:**

Viðmælt at geva loyvi galdandi í 5 ár

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at lata loyvi, galdandi í 5 ár, treytað av at allar aðrar myndugleikagóðkenningar eru í lagi.
Ásla Leila Johansen luttók ikki í viðgerini av málinum.

Formansváttan: ____________

VÁGA KOMMUNA

## 60/21 Fyrispurningur frá Nám um at gera samstarvsavtalu um undirvísingartilfar til Skúlan á Giljanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 08.03.2021 | 23/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 26/21 |
| 3 Býráðið | 30.03.2021 | 60/21 |

**Málslýsing:**

Nám veitir tænastur og undirvíngartilfar til fólkaskúlan. Kommunufelagið hevur vegna kommunurnar samráðst við Nám um eina standardavtalu. Tað er tó upp til einstøku kommununa um hon ynskir at undirskriva avtaluna. Avtalan er galdandi fyri trý ár og er kostnaðurin:

1. Skúlaárið 21/22 – 1020 kr./næming
2. Skúlaárið 22/23 – 1100 kr./næming
3. Skúlaárið 23/24 – 1150 kr./næming

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 08. marts 2021:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

## 61/21 Áhugafelagið Heimdal søkir um rakstrarstuðul á kr. 20.000 árliga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 08.03.2021 | 22/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 31/21 |
| 3 Býráðið | 30.03.2021 | 61/21 |

**Málslýsing:**

Í samband við rakstur av bátinum Heimdal, søkir áhugafelagið um rakstrarstuðul á kr. 20.000 árliga.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 08. marts 2021:**

Viðmælt at stuðla við kr. 20.000.

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

## 62/21 Umsókn um leigu av lendi í fjøruni vestan- og sunnanfyri matr.nr. 249e í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.03.2021 | 6/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 27/21 |
| 3 Býráðið | 30.03.2021 | 62/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 249e í Miðvági søkir um loyvi at leiga lendi.

Matrikkulin liggur í serstakari byggisamtykt A1 fyri eitt øki inni á Bakka í Miðvági.

Umsøkjari upplýsir at Gamla neysti er í so ringum standi, at støða er tikin til at ríva tað niður og byggja nýtt neyst/íbúð.

Í fyrsta lagi verður søkt um loyvi at leiga lendi sunnan- og vestanfyri matrikkulin.

Talan er um at leiga 1m av matr. 233d og uml. 4m oman í fjøruna, so nýggja neystið fluktar við útvegg á kapprórarneystinum suðureftir, hetta liggur í øki G: *Neyst, báta-, húsvognapláss, "marina" við felagshúsi*. Sí viðhefta skjal.

**Vinnu- og havnanevndin 12. marts 2021:**

Viðmæla at leiga umsøkjarnum matr.nr. 233d.

Sólfríð Fjallsbak luttók ikki í viðgerðini av hesum málinum

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at beina málið í teknisku nevnd.
Sólfríð Fjallsbak luttók ikki í viðgerini av málinum.

Formansváttan:__________

# 63/21 Endurskoðan av gjaldi fyri bátapláss í Vága kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.03.2021 | 7/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 28/21 |
| 3 Býráðið | 30.03.2021 | 63/21 |

**Málslýsing:**

Formaðurin í Vinnu- og havnanevndini leggur uppskot fyri býráðið um at endurskoða gjaldi fyri bátapláss í Vága kommunu.

Uppskotstillarin hevur fyngið prísir til vega frá Tórshavnar og Vestmanna kommunu. Í fylgiskjalið til málið síggjast hesir prísir.

Heitt verður á nevndina um at umrøða málið, og um møguligt koma við uppskotið um, hvat kostnaðurin skal verða frameftir.

**Vinnu- og havnanevndin 12. marts 2021:**

Nevndin mælir til at hækka allar prísir við 25%.
Fyri bátar, ið ikki hoyra til í kommununi hækkar prísurin upp í 200%

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**

Viðmælt at taka undir við vinnu- og havnanevndini. Mælt verður eisini til at endurskoðað prísirnar 4 hvørt ár.

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

## 64/21 Borgarstjórin leggur uppskot fyri býráðið um at broyta byggisamtyktina fyri Grótbrotið í Sandavági.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.03.2021 | 8/21 |
| 2 Býráðið | 30.03.2021 | 64/21 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin leggur uppskot fyri býráði, um at broyta byggisamtyktina fyri Grótbrotið í Sandavági.

Í dag liggur øki í byggisamtyktini sum øki F- Almenn frítíðarøki, og leggur uppskotið upp til at broyta hetta til øki C-Vinnuendamál.

**Vinnu- og havnanevndin 12. marts 2021:**

Viðmælt

**Býráðið 30. marts 2021:**

Samtykt at taka málið av skrá.

Formansváttan: ____________

VÁGA KOMMUNA

## 65/21 Uppskot um at flyta býráðsfundin inn á býráðskrivstovuna í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2021 | 65/21 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin skjýtur upp, at flyta almennu býráðsfundirnar inni á býráðsskrivstovuni á Hammershaimbsvegi 1 í Sandavági, framyvir. Almennir býráðsfundir verða í dag hildnir í bygdaskúlanum í Miðvági, sbrt. býráðssamtykt frá 03.02.2009.

**Býráðið 30. marts 2021:**

Samtykt at taka málið av skrá.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 19:45

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jens Gaardlykke

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:____________